# Hvør eigur bóltin?

KRISTIN MICHELSEN
Borgarstjóri



**Um at krevja og ikki vilja gjalda**

Fyriuttan at avgreiða skip hevur ein havn, í Føroyum ella uttanlands, eisini aðrar uppgávur. Hon fremur vanligt eftirlit á sjóøkinum út til kommunumarkið, sum eru havnamerkini.

Eisini er havnaumsitingin av landsmyndugleikunum áløgd nakrar eftirlitsuppgávur. Hesar eru

- Lóg um havumhvørvi
- Kunngerð um vernd
- Góðkenning sum havn, ið tekur móti førum úr ikki-Schengen øki

Hesar eftirlitsuppgávur seta greitt ta fyritreyt, at havnin hevur myndugleika á sjóøki, innsiglingarleið og á bryggju, og hevur eina vaktarskipan, sum kann fremja hetta eftirlitið.

Allir skattaborgarar høvdu óivað verið glaðir, um teirra skattakrónur til aðrar vaktarskipanir, t. d. løgregluna, bert vóru nýttar tá brúk var fyri tí, tvs tá politistarnir máttu út á gøtuna og »gera nakað til nyttu«, men eftirlit og vaktarhald virka ikki soleiðis. Ein er noyddur til at hava eina umsiting og tilbúgving, sum er har, tá brúk er fyri henni.

Hetta er tað okkara landsmyndugleikar í snævurskygni gera seg til talsmenn fyri. Fyrst gera teir sjóøki hjá Tvøroyrar Havn til einkis við at sáa iva um myndugleikan og at siga, at Smyril siglir ikki inn á Tvøroyrar Havn, harnæst hava teir einki ímóti at brúka Trongisvágsfjørð sum miðstøð, men vilja ikki vera við til at gjalda fyri ta umsiting og eftirlit, teir sjálvir eru við at krevja gjøgnum lógir og kunngerðir.

# Tí velji eg ríkisfelagsskapin

MARTIN PAULI JACOBSEN

Tjóðaskaparfólk siga, at eg fyrst og fremst eri føroyingur, og at eg fyrst finni mín sanna identitet, tá vit fáa fullveldi.

Eftir at hava búð uttanlands í nógv ár flutti eg til Føroyar. Eg flutti ikki heim fyri at finna ein kollektivan føroyskan identitet, men vegna arbeiði og familju mína.

Eg eri komin til ta niðurstøðu, at eg ikki havi nakað meiri felags við ein persón, bert tí hann er føroyingur.

Tað er ikki stuttligari at vera saman við føroyingum enn øðrum. Eg fyritrekki at vera saman við fólki, sum hava somu áhugamál/virðir, sum eg sjálvur.

Eg síggi meg sum »eg«. Tað er fultkomiliga irrelevant, um eg eri føroyingur, danskari ella kanska kinesari ....... **Tað, sum hevur týdning, er at eg eri eg**.

Hetta undirbrotliga tjóðskaparliga stemplið, ið onnur vilja hanga rundan um hálsin á mær, vil eg gjarna sleppa av við. Eg síggi meg sum alheims borgara.

Eg vil liva í einum landi, ið brúkar sínar avmarkaðu ressoursir á ein rationellan hátt, so at ressoursir verða til yvirs til tey veiku, sjúku og pensjonistarnar. Eg vil ikki betala fyri dýrar óneyðugar dupultfunktiónir, sum vit longu hava.

Hetta landið ger júst tað mótsatta.

Hvar eru tey rationellu argumentini í loysingarrørsluni?

Eg dugi ikki at síggja annað enn **følilsir** og **undirlutakenslir.** Eg gangi inn fyri einum rationellum landi og at útdelegera allar tær tænastur, sum ikki eri kjarnutænastustur. Hetta kunnu vit í ríkisfelagsskapinum.

**Tað, sum hevur týdning, er at hetta landið fungerar, er rationelt og kann kappast við onnur lond á høgum stigi**.

Tað finnast vigtigari ting í lívinum enn at fáa »**Made in Føroyar**« stempul á reyvina.

# Gott Hjørdis!

JOHAN PETERSEN



**At kalla allir føroyskir journalistar er politiskir. Tí var tað sum eitt frískligt lot at hoyra ein seriøsan viðmerkjara í útvarpinum greina politiska støðu á einum neutralum grundarlagi**

Í útmerkaðu sendingini Eygsjón eftir tíðindini á miðdegi, sum útvarpið er farið undir, var á miðdegi mikudagin greinan av innanhýsis støðuni í Sambandsflokkinum.

**Politiskur og ópolitiskur viðmerkjari**

Tveir viðmerkjarar vóru bodnir at greina støðuna innanhýsis í Sambandsflokkinum. Annar var Brynhild Thomsen, journalistur og blaðstjóri á Dimmalætting, sum tíverri eins og flestu føroysku journalistarnir ikki megnaði at halda síni egnu politisku áskoðan burtur og var meira upptikin av at viðgera Sambandsflokkin út frá egnari politiskari áskoðan heldur enn sakliga. Álvaratos, hvar er fakligi stoltleikin, Brynhild?

Hin viðmerkjarin var stjórnmálafrøðingurin Hjørdis Gaard, sum við síni sakligu og róligu viðmerkingum viðgjørdi málið, so sum tað eigur at vera. Gott Hjørdis, soleiðis eigur ein viðmerkjari at vera og gera!

**Løgmaður veikur ella strekur?**

Brynhild vildi eisini gera løgmann til ein veikan løgmann. Javel, er tað, at vera diplomatiskur og sakligur og megna at halda saman upp á eina samgongu, sum spennur frá ytsta samband til ytstu loysing, og vera væl dámdur av Føroya fólki, er tað at vera veikur, ja so er løgmaður veikur.

Men eg vildi heldur sagt, at tað er at vera sterkur! Og tað tykjast alt fleiri og fleiri føroyingar eisini at halda.

# Virða vit nýggju psykiatrilógina?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Nú frættist, at Deild 1 á Psykiatriska Deplinum vegna sparingar letur aftur 1. oktober og árið út. Sama dag sum deildin letur aftur er gildiskoman fyri nýggju psykiatrilógini. Lógin skal millum annað: *tryggja, at uppihaldið hjá sjúklingunum á sjúkrahúsi fer fram undir tíðarhóskandi umstøðum og kørmum*, verður sagt í viðmerkingunum.

Letur deild 1 aftur er lítið samsvar millum orð og gerðir, eftir mínum tykki!

Tey sum verða innløgd á deild 1 kunnu til dømis vera:

- Fólk, sum eru innløgd vegna sálarsjúku fyri fyrstu ferð
- børn og ung sum hava tørv á innlegging – eftirsum eingin barnapsykiatrisk deild er
- fólk, sum hava verið sera sjúk, og kanska verið á afturlatnari deild, men sum nú hava tað frægari, men ikki eru klár at verða útskrivað kortini
- Yngri fólk við etingarólagi, sum til fyri fáum árum síðani oftani vórðu send til viðgerðar í Danmark
- Fólk í øllum aldri við tunglyndi og svárari angist

**Færri songarpláss**

Tá deild 1 letur aftur, verða brádliga 14 seingjarpláss færri til sálarsjúk fólk. Á Psykiatriska Deplinum eru í dag 50 seingjarpláss. Av teimum eru 20 seingjarpláss, sum verða brúkt av liðugtviðgjørdum sjúklingum, sum bara bíða eftir einum bústaðartilboði í Nærverkinum. Nøkur teirra hava verið á deildunum síðani í 70-unum. Sostatt eru tað 30 songarpláss til viðgerð av sjúklingum, sum hava her og nú viðgerðartørv. At tað soleiðis verða skorin burtur 14 songarpláss vil siga, at songarplássini til fólk við aktuellum viðgerðartørvi verður skorið við við 50 prosentum. Tað fer at hava svárar avleiðingar fyri psykiatriskar sjúklingar, tað sum eftir er av árinum. Tað merkir, at bíðilistin til innlegging verður longri. Fólk verða helst útskrivað fyrr ynskiligt í summum førum, og tey sum verða innløgd verða verri fyri enn áður, tí rúm ikki er fyri teimum, tá tey hava tørvin. Tað merkir, at viðgerðartíðin verður enn longri.

**Birta vón, hvør hjá øðrum**

Tað sum kanska eisini eyðkennir deild 1 er, at sjúklingarnir hava fótað sær so mikið, at tey kunnu spegla sær og birta vón hvør hjá øðrum. Tosa verður við tey um útbúgving og arbeiðsmarkna og kanska funnið verður útav, hvussu tey kunnu koma til arbeiðis aftur. Nú deildin letur aftur, missa sjúklingarnir hendan møguleika. Tá tey eru innløgd á deild 1 fáa tey alla ta professionellu hjálpina tey hava tørv alt samdøgrið – fleiri teirra hava ikki orkuna til at taka av ambulantu viðgerðini. At vera á aðrari yvirfyltari deild á stovu saman við fleiri og nógvari órógv er ikki besta sálarbótin.

**Eingin barna – og ungdómsdeild**

Ein barna –og ungdómspsykiatrisk deild er ongantíð raðfest ovaliga politiskt, og tí hevur deild 1 vanliga verið deildin hjá børnum, ungum og teirra familjum, tá illast hevur viljað til. Nú er afturlatin deild ella ein deild, har fólk eru sera illa fyri sálarliga einasti møguleikin. Ein alt annað enn ynskilig støða fyri barnið, hin unga og familjuna.

**Vandi at missa starvið**

Fleiri teirra, sum í dag verða innløgd á deild 1 hava ein arbeiðsgevara, men nú sjúkralegan kann gerast væl longri enn í dag, eru tey í størri vanda fyri at missa starvið. Ofta hava tey ikki orkuna til at varðveita sambandi við arbeiðsgevarní longu sjúkraleguni. Vandin fyri at missa starvið verður alsamt størri, jú longri tey eru sjúkrameldað. Missa tey starvið, kann sjúkralegan gerast enn longri og ein negativ ringrás er byrjað.

**Starvsfólkini hava megnað nógv**

Psykiatriski depilin hevur megnað nógv nýggj viðgerðartilboð, nógv nýggj átøk, umframt at útbúgva starvsfólkini væl, at rekruttera og fasthalda góðum starvsfólkum, hóast vónleysu karmarnar og lítla politiska raðfesting.

**Ikki raðfestur**

Mangt bendir á, at Psykiatriski Depilin hevur havt avbera lága politiska raðfesting øll árini. Fleiri prógv eru um hetta:

Verandi karmarnir hjá Psykiatriska Deplinum tala fyri seg. Fysisku karmarnir eru niðurslitnir og á allar hættir ótíðarhóskandi. Ofta eru fleiri sjúklingar á hvørjari stovu – hvør við sínum tørvi. Felags toilett og baðirúm er eisini gerandiskostur.

Ætlanir um at byggja nýggjan depil ella umvæla verandi depil er útsettar fleiri ferðir.

Á Psykiatriska Deplinum búgva framvegis fólk – nøkur teirra síðani í 70-unum – tí eingin hevur raðfest polititiskt, at byggja teimum eitt hóskandi heim. Tí tey búgva á Psykiatriska deplinum fáa tey einans lummapening og ikki fyritíðarpensjón, sum tey høvdu fingið, um tey høvdu havt eina varda íbúð ella búð í einum sambýli.

**Nýggja psykiatrilógin**

Fyrsti oktober er gildiskoman fyri nýggju psykiatrilógini. Viðmerkingarnar hjá Heilsumálaráðnum til hesa vóru millum annað: ***"tryggja, at uppihaldið hjá sjúklingunum á sjúkrahúsi fer fram undir tíðarhóskandi umstøðum og kørmum, so sum bygningar og høli, normering av seingjum og av starvsfólki .................... at landsstýrið skal bjóða sjúklingunum, at uppihaldið á sjúkrahúsi fer fram undir tíðarhóskandi umstøðum, sum eru í samsvari við góðan psykiatriskan sjúkrahússtandard, við tí í hyggju at fyribyrgja og avmarka nýtsluna av tvingsli."***

Sjálvan gildiskomudagin fyri nýggju psykiatrilógini 1. oktober, letur deild 1 aftur restina av árinum. Í hesum ljósi tykjast viðmerkingarnar margháttligar – fyri ikki at siga pínligar.

**Framtíðin**

Vóni, at bæði eykajáttanin til landssjúkrahúsið og komandi figgjarlóg fara at bera brá av, at vit taka nýggju psykiatrilógina og viðmerkingarnar til hennara frá Heilsumálaráðnum í størsta álvara. Lat okkum veruliga tryggja – ikki bert við føgrum orðum – at uppihaldið hjá sjúklingunum á sjúkrahúsi fer fram undir tíðarhóskandi umstøðum og kørmum.